


*Í Smyril Line eru boðini, at tey missa á leið 100.000 kr., hvørja ferð Norrøna er við bryggju í Lerwick*

# Ósemja um Smyril-Line

**Hóast ferðaætlanin til Lerwick nú verður munandi skerd, so hevur hetlendski Menningargrunnurin framvegis álit á Smyril Line. Men tað eru tað ikki øll, sum hava**

NORRØNA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er ikki bara væl móttikið í Hetlandi, at lokali menningargrunnurin tók avgerð um at seta 8 mió kr. afturat í Smyril-Line. Hetta sum liður í avtaluni, sum varð gjørd millum partaeigararnar, eftir at Hetlendski menningargrunnurin hevði stevnt Smyril-Line fyri brot á partaeigaraavtalu.

Orsøkin til hetta var, at hetlendski grunnurin, sum er ein av heilt stóru íleggjarunum í Norrønu, samstundis hevur góðtikið, at Norrøna í framtíðini fer at sigla munandi minni upp á Lerwick, enn tey hava gjørt. Og umframt at spýta meira partapening í føroyska reiðaríið, hevur grunnurin eisini játtað at hjálpa til í marknaðarføringini í og av Hetlandi.

- Einasti mátin, sum vit kunnu halda Smyril Line flótandi og áhaldandi fáa Norrøunu á vitjan, er at seta meira pening í. Hinir partaeigararnir seta eisini meira pening í, og skulu vit ikki missa okkara ávirkan fullkomuliga, mugu vit fylgja við.

- Nú hava vit so sett £ 700.000 afturat í felagið. Eg veit væl, at tað er við eini skerdari ferðaætlan, men gjørdu vit ikki hetta, so steðgaði Norrøna at koma higar, sigur Josie Simpson, sum er nevndarformaður í grunninum.

Shetland News skrivar annars, at Menningargrunnurin hevur møguleika at nýta íalt £ 4.700.000 til Smyril Line. Hetta er peningur, sum varð játtaður til ætlaða keypið av Fjord-Line, men sum grunnurin enn ikki hevur brúkt. Og hóast nakrir nevndarlimir eru ímóti hesi heimildini, so tykist tað vera upp til nevndina sjálva at gera av, hvørt hon verður nýtt ella ikki.

# Eftirlønir á sjómannadegnum

**Føroya Banki skipar týskvøldið 15. august kl. 19.30 fyri eftirlønarfundi í Skálanum í Klaksvík. Fundurin er ætlaður fólki í fiskivinnuni, og til ber at boða frá luttøku áðrenn 11. august**

EFTIRLØN
*tíðindaskriv*

Í seinastuni hava eftirlønarviðurskifti føroyinga verið nógv umrødd, og ført hevur millum annað verið fram, at føroyingar eru eftirbátur á hesum øki.

Føroya Banki bjóðar fram eina røð av tænastum í sambandi við pensjónsuppsparing, og í sambandi við Føroya Sjómannadag verður ljós varpað av pensjóns- og eftirlønarviðurskiftini hjá starvsfólkum í fiskivinnuni bæði á sjógvi og landi.

Á fundinum 15. august kl. 19.30 í Skálanum fara fleiri serkøn fólk at greiða frá. Hans Peter Clementsen, deildarleiðari hjá Føroya Banka í Klaksvík, leggur fyri við at bjóða vælkomin.

Óli Jacobsen, formaður í Føroya Fiskimannafelag, fer síðan at greiða frá pensjóns- og eftirlønarviðurskiftunum hjá føroyskum sjómonnum.

Joan Stampe og Tummas Pauli Mýri, íløguráðgevar í Føroya Banka, fara at greiða frá møguleikum at spara upp pensjónir og eftirlønir, og fundurin endar við, at Anna Maria Ragnarsson, pensjóns- og íløguráðgevi í Føroya Banka, takkar fyri.

## Menningarhjálpin á skránna

**Í døgunum 8. – 10. september 2006 verður stór útimissiónsstevna í Nesvík**

STEVNA
*tíðindaskriv*

Fríggjakvøldið 8. september fer løgmaður at seta stevnuna og grundin er m.a., at hann hevur uttanríkismál sum málsøki og harvið eisini menningarhjálp. Landsstýrið hevur hækkað stuðulin til menningarhjálp uppí 6 milliónir árliga og verður hann bæði brúktur til mennandi verkætlanir og vanlukkuhjálp.

Heimamissiónin hevur nú í nøkur ár arbeitt við menningarhjálp millum gøtubørn í Kiev, Ukraina. Tað eru hjúnini Jórun og Nurlan Malaikev, sum standa fyri arbeiðinum har. Í løtuni hava tey eini 6 hjálparfólk afturat sær, sum koma frá ymiskum londum, umframt Ukraina.

Í arbeiðinum millum foreldraleys børn og gøtubørn, er arbeiðið hjá Heimamissiónini eitt sokallað NGO (Non Govornment Organisation) arbeiði. Tað merkir millum annað, at tað er eitt humanitert og ópolitiskt arbeiði, sum verður gjørt fyri at hjálpa gøtubørnunum.

Tað nýggjasta tiltakið er, at Heimamissiónin hevur stovnað eina faddurskipan, sum vit nevna "Vónarbørn." Við faddurskipanini hevur tú møguleika at hjálpa nøkrum av hesum foreldraleysu børnunum.

Um tú ynskir at hjálpa ella fáa meira at vita, kanst tú fara inn á www.vonarborn.mission.fo


Lesið Sosialin so eru tit við